heilsutrygd

Klaksvík, mánadagur 28. sep., 2026

Avgerð um góðkenning hjá Heilbrigdi

Heilbrigdi fekk upprunaliga fyribilsgóðkenning frá Heilsutrygd tann 22. desember 2021.

Eftir tríggjar vitjanir í 2022 og 2023 fekk Heilbrigdi 26. september 2023 endurnýggjað fyribilsgóðkenning í 6 mánaðar.

19. mars 2024 søkti nevndarformaðurin um longda freist, tí at Heilbrigdi saman við Heilsumálaráðnum kannaði nýggjar møguleikar at útvega skikkaði høli. Heilsutrygd luttók á fundum, framdi tvær eftirlitsvitjanir í 2024 og hevði harumframt samskifti við leiðaran gjøgnum 2025. Tann 17. februar 2025 fekk Heilbrigdi aftur endurnýggjan av fyribilsgóðkenning, hesu ferð í 12 mánaðir.

Hetta skriv tekur útgangsstøði í eftirlitsvitjan í teimum nýggju, umbygdu hølunum, Kerit, 22. apríl 2026.

Seinkanin frá upprunaligu eftirlitsvitjanini 24. juni 2021, og fram til nú, snýr seg fyrst og fremst um arbeiðið hjá Heilbrigdi við at fáa hølisviðurskifti í rættlag. Hetta er høvuðsátalan í 1., 2. og 3. fyribilsgóðkenning.

Formliga tekur arbeiðið hjá Heilsutrygd við góðkenning av viðgerðarstovnum, ið veita rúsviðgerð, støði í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 2019, kunngerð nr. 75 frá 29. mai 2020 umframt kunngerð nr. 79 frá 15. juni, 2023. Heilsutrygd ráðfórir seg eisini regluliga við ráðgevar frá Socialtilsyn Hovedstaden, sum hava drúgvar royndir við tílíkum góðkenningum av rúsviðgerðarstovnum.

Hetta skriv er ikki ein full meting av dygdini í tilboðnum, men er eitt ískoyti til tær fyribilsgóðkenningarnar, ið longu eru gjørdar. T.v.s. at tað er átalan um hølisviðurskifti umframt viðmerking um eftirútbúgvingar, ið skulu endurmetast.

1. Hølisviðurskiftini eru nú fult út virðilig og hóskandi til rúsviðgerð

Áhaldandi arbeiðið hjá nevndini við at finna eina loysn á hølisavbjóðingunum er so gott sum komið á mál.

Pláss er fyri 10 borgarum í nýggju, nýumvaldu hølunum, Kerit, í náttúruvakra umhvørvinum omanfyri viðarlundina í Tórshavn. Talan er um einastovur við egnum wc. Stovnurin hevur eisini móttøkuhøli, fundarhøli umframt samrøðuhøli til rúsviðgerðina.

Har er gott pláss, og í hølunum er spísistova og dagligstova í einum umframt ein avsíðis sjónvarpsstova. Køkur og goymslurúm eru á professionellum støði, og starvsfólkið hava tilsamans fýra høli til teirra skrivstovuarbeiði.

Nakrir snøklar eru eftir, t.d. í fundarhølinum, sum verður brúkt til viðgerð. Um vit vilja nærkast okkum tí perfektu loysnini, eigur bygningurin at verjast eitt sindur betur við trøðum og plantum, soleiðis at fólk, ið ganga framvið, ikki síggja so væl inn. Heilbrigdi er í samskifti við gartnarar um hetta.

Harumframt eru atkomuviðurskiftini avmarkaði, serliga viðvíkjandi parkering. Aftur her er Heilbrigdi í samskifti við Tórshavnar Kommunu um møguliga loysn við fleiri parkeringsplássum á økinum.

Tað, sum er eftir, eru veruliga smálutir í mun til heildarúrslitið, ið eru flottir, væleygnaðir og tíðarhóskandi karmar um rúsviðgerð í hjartanum av Tórshavn.

2. Heilbrigdi arbeiðir áhaldandi við at tryggja fakligu førleikarnar

Ein reyður tráður gjøgnum tilgongdina við góðkenning er lógarkravið um, at í minsta lagi helvtin av rúsviðgerunum skulu hava *"góðkenda útbúgving sum rúsdrekkaviðgeri ella rúsevnaviðgeri við hartil hoyrandi starvsroyndum og viðkomandi skeiðum"*.

Fyri tað fyrsta vóru ongar alment góðkendar útbúgvingar innan rúsøki í Danmark – sum er tað mest upplagda øki hjá viðgerðunum at fáa sína eftirútbúgving – tá arbeiði við at góðkenna rúsviðgerðarstovnarnir byrjaði. Sundhedsstyrelsen og Sosial- og Boligstyrelsen hava nú ment ein leist fyri tílíkar eftirútbúgvingar, og fleiri útbúgvingarstovnar í Danmark bjóða nú slíkar útbúgvingar. Talan er um heilt nýggj eftirútbúgvingartilboð.

Í tilgongdini frá 2020 hevur Heilsutrygd tí í hvørjum einstøkum føri mett um, hvørt eftirútbúgvingar- og supervisiónsaktivitetur eftir øllum líkindum kann sigast at vera á sama støði sum góðkendar útbúgvingar í øðrum londum, eitt nú Onglandi.

Harnæst eru starvsfólk komin og farin frá Heilbrigdi í árunum frá fyrstu eftirlitsvitjan til nú.

Sum nú er, eru tríggir viðgerar á Heilbrigdinum. Tveir av hesum hava útbúgving sum kognitiv misbrugsrådgiver frá Region Hovedstaden, umframt at teir fáa supervisión frá útbúgvingarstaðnum.

Autoriseraður sálarfrøðingur er fast knýttur at Heilbrigdinum, og hann hevur m.a. supervisión við viðgerunum ein fyrrapart hvønn mánað. Viðgerarnir skiftast eisini um at luttaka í bólkaviðgerð, sum sálarfrøðingurin hevur við borgarum aðruhvørja viku.

Programmleiðarin á Heilbrigdi er sálarfrøðingur, og leiðarin hevur sjálv eina 4-ára útbúgving sum gestaltterapeut.

Afturat hesum hava fleiri starvsfólk ymiskar styttri eftirútbúgvingar innan eitt nú Motivational Interviewing, Dialektiska atferðarterapi umframt modulir frá fyrrverandi DAC (Danish Addiction Counselor) útbúgvingini.

Heilbrigdi hevur boðað frá, at tey raðfesta at lúka hetta kravið um, at helvtin av viðgerðunum hava góðkenda eftirútbúgving innan rúsviðgerð.

3. Avgerð

Avgerðin hjá Heilsutrygd er, at Heilbrigdi er góðkent sum viðgerðarstovnur, ið veitur rúsviðgerð. Henda avgerð byggir á hesa seinastu eftirlitsvitjan umframt alt eftirlits-, fundar- og samskiftisvirksemi frá 2020 og framm. Sambært § 3 í løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai er henda góðkenning galdandi í 5 ár.

At enda eigur at verða nevnt, at Heilsutrygd kann taka góðkenningina aftur, um viðgerðarstovnurin ikki longur lýkur góðkenningarkrøvini, ella um átaluverd viðurskifti eru viðvíkjandi virkseminum.

Álvarsamar átalur – her verður virksemið antin steðgað, ella verða skjótar ábøtur kravdar, um virksemið skal góðkennast og halda fram.	• Einki.
Menningarpunkt – her skal ein sannførandi ætlan leggjast fyri at betra um viðurskiftini, um góðkenning skal varðveitast við næsta eftirlit um 5 ár.	• Einki.
Uppmerksemispunkt – mett verður, at virksemið kann betrast, tó uttan at hetta hevur beinleiðis ávirkan á góðkenningina.	• Bygningurin eigur at verjast eitt sindur betur við trøðum og plantum, soleiðis at fólk, ið ganga framvið, ikki síggja so væl inn • Parkeringsmøguleikarnir eiga at verða betraðir

Heilsutrygd, Klaksvík, 28. sep., 2026,

Egil á Bø, stjóri	Petur Martin Hansen, deildarleiðari	Suni Poulsen, ráðgevi